## 70-ára gomul mamma

Omkari Panwar, ið býr í býnum Muzzaffarnagar norðanfyri New Dehli í India, átti í dag tvíburar – 70 ára gomul. – Endiliga fingu vi tein son og arving. Vit hava biðið til Gud, til halgimenni og vitjað heilað støð fyri at biðja um ein arving, sigur pápin, 77-ára gamli Charan Singh Panwar. Saman hava tey framman undan tvær vaksnar døtur og fýra ommu- og abbabørn. 70-ára gamla Panwar noyddist tó gjøgnum fertilitetsviðgerð, fyri at tað skuldi eydnast at gerast við barn. Tað kostaði so nógv, at familjan mátti seljaoksarnar og pantseta jørðina.

## Føroyar stuðla børnum í Rwanda

Uttanríkisráðið hevur latið Plan-International hálva millión í menningarstuðli til at standa fyri eini verkætlan, har børn tala sína søk í fjølmiðlunum. Endamálið við verkætlanini er at varpa ljós á rættindi barnanna við at lata rødd teirra tala í útvarpi og fjølmiðlum annars, soleiðis at børnini gerast virkin í arbeiðinum at menna orðaskiftið í Rwanda. Í 1994 var fólkadráp framt í Rwanda, og um 800.000 fólk vórðu myrd eftir bert 100 døgum. Í Rwanda eru tveir ættarbólkar, hutuar sum eru um 84% av fólkinum og tutsiar, sum eru um 15 prosent. Ein lítil bólkur av hutuarum stóðu fyri drápunum, og teir nýttu m.a. miðlarnar at heita á hutuar um at gera sína skyldu at drepa tutsiar. Miðlarnir høvdu tí ein ræðandi leiklut. Málið er nú at nýta miðlarnar positivt. Hetta skal gerast við at førleikamenna børn, ung og fjølmiðlafólk, sum skulu lýsa og umrøða evnir, sum hava við børn og ung at gera. Verkætlanin er í fyrsta lagi í eitt ár, og byrjar í oktober. Uttanríkisráðið fær frágreiðing frá Plan-International um gongdina í verkætlanini í november 2009.

# Nýggj bók um ísraelsfólk




85 ára gamli Osvald Kjærbo hevur seinastu fimm árini givið eina bók út á hvørjum ári. Hansara nýggjasta bók, "Skuggamyndir hins komandi", er júst komin í bókabúðirnar

ave

**Nýggj bók eftir prædikumannin Osvald Kjærbo um ísraelsfók er ætlað sum ein eggjan og vegleiðing til øll kristin í dag**

ÁTRÚNAÐUR

Hvørt mansbarn í Føroyum man kenna frásøgnina í Bíblinui um, hvussu Gud leiddi ísraelsfólk úr Egyptalandi og gjøgnum oyðimørkina til tað lovaða landi.

Hetta er eisini evnið í nýggjari bók eftir prædikumannin og høvundan Osvald Kjærbo.

### Vegleiðing

Við bókini *Skuggamyndir hins komandi. Úr Egyptalandi til Kaanan – Úr trældómi til frælsi* setir Osvald Kjærbo frásøgnina eisini í mun til okkara tíð. Hann vísir á, at frásøgnin um ísraelsfólk samstundis er ætlað sum vegleiðing og eggjan til øll kristin í dag, ið eins og ísraelsfólk á sinni, eisini ferðast gjøgnum eina oyðimørk á ferðini móti lovaða landinum, sum er himmalin.

Osvald Kjærbo sigur seg altíð hava verið sera hugtiknan av frásøgnini um ferðina hjá ísraelsfólki. Sjálvur hevur hann granskað nógv í evninum og eisini undirvíst í tí í mong ár á møtum og skeiðum kring landið.

Í bókini vísir Osvald Kjærbo á, at ungdómurin sjáldan hoyrir um hetta evnið á møtum í dag. Tí hevur hann skrivað bókina *Skuggamyndir hins komandi*, ið hann vónar, at lesarin kann brúka sum vegleiðing og andaliga hjálp.





CTC-vørumerkið er vælkent hjá føroyingum. Við meira enn 50 árum á føroyska marknaðinum nýtist ikki at siga meira...

Tygum fáa CTC-hitapumpuna hjá Mariu Poulsen.

Maria Poulsen

Tel 312 000 | Fax 315 970 | mp@mp.fo | www.mp.fo